Stórur brúktbilamarknaður

Mazda 323 F 1,5i GLX
Grønur, 5 hurðar, 5 gear,
Km.44.000, árg. 05/99
120.000,-

Mazda 323 S 1,5i LX
Reyður, 4 hurðar, 5 gear,
Km.68.000, árg. 05/97
90.000,-

Mazda 323 S 2,0 Diesel LX
Grønur, 4 hurðar, 5 gear,
Km.84.000, árg. 01/98
90.000,-

Mazda 323 S 2,0 Diesel LX
Gráur, 4 hurðar, 5 gear,
Km.84.000, árg. 06/98
105.000,-

Mazda 929 S 2,2i GLX
Sýnaður 05/01
Bláur, 4 hurðar, 5 gear,
Km.145.000, árg. 03/89
28.000,-

Fiat Multipla 1,6
Gráur, 5 hurðar, 5 gear,
km 39.000, árg. 01/00
138.000,-

Mazda 323 S 1,3 LX
Sýnaður 02/01
Reyður, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 1987
10.000,-

Ford Escort 1,8TD St.Car
Sýnaður 02/00
reyður, 5 hurðar, 5 gear,
Km.50.000, árg. 08/97
110.000,-

Volvo 440 GLT
Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 04/92
2 sett av dekkum á orginal felgum
Sýnaður 12/00



SERTILBOÐ 48.000,-

Renault Megane 1,6e Sedan
Sýnaður 09/00
Beige, 5 hurðar, 5 gear,
Km.60.000, árg. 12/96
80.000,-

Honda Civic S 1,4 IS
Sýnaður 04/02
Hvítur, 4 hurðar, 5 gear,
Km.76.000, árg. 12/98
98.000,-

Renault Megane 1,4e
Grønur, 5 hurðar, 5 gear,
Km.34.000, árg. 08/98
94.000,-

Renault Megane 1,4e
Grønur, 5 hurðar, 5 gear,
Km.58.000, árg. 04/97
120.000,-

Renault Megane 1,6e
Sýnaður 09/00
Reyður, 5 hurðar, 5 gear,
Km.60.000, árg. 12/96
80.000,-

Mazda E2200 PanelVan Høgt tak
Reyður, 5 hurðar, 5 gear,
Km.110.000, árg. 05/97
75.000,-

Mazda B2500 PlusCab SDX 4x4
Bláur, 2 hurðar, 5 gear,
Km.35.000, árg. 02/00
140.000,-

Peugeot Partner 1,9 TD
Gráur, 4 hurðar, 5 gear,
Km.71.000, árg. 03/00
110.000,-

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

# Sum at sláa í eina dýnu



*- Tá ið alt kemur til alt, so stendur og fellur endaliga avgerðin um framtíðarstøðu Føroya við viljanum hjá fólkinum. Tú fært ongantíð stjórnina at viðganga nakað, sum inniber, at Danmark má lata nakað frá sær, staðfestir Tórbjørn Jacobsen*

**Tórbjørn Jacobsen viðgongur, at tað nyttar lítið at spyrja danskar ráðharrar um ríkisfelagsskapin og støðuna hjá Føroyum og Grønlandi. — Men vit kunnu ikki gera annað enn spyrja og vísa á okkara støðu og sjónarmið, sigur føroyski fólkatingsmaðurin**

TJÓÐSKAPARSTRÍÐ

*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Enn einaferð fór Tórbjørn Jacobsen sum av torvheiðum út úr Fólkatingssalinum, eftir at hann hósdagin gjørdi enn eina roynd at vísa á, at ríkisfelagsskapurin er alt annað enn ein felagsskapur við trimum javnsettum londum.

Í síðstu viku var tað Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, sum var í hólmgongu við Tórbjørn Jacobsen, og hósdagin skuldi løgmálaráðharrin, Lene Espersen, svara spurningum frá føroyska fólkatingsmanninum.

Tórbjørn Jacobsen royndi at vísa á, at tað er andsøgn millum veruleikan og grundlógina, sum sigur, at tað eru trý javnsett lond í danska ríkinum, Føroyar, Danmark og Grønland.

Londini eru ikki javnsett, og tað er skeivt av stjórnini at tvíhalda um hetta. Hví verður hesin pástandurin endurtikin ferð aftaná ferð, spurdi Tórbjørn Jacobsen løgmálaráðharran.

Tórbjørn Jacobsen vil vera við, at londini eru ikki líka, tá ið veruleikin er tann, at Føroyar og Grønland ikki sleppa at umsita ávís málsøki, so sum uttanríkis-, verju- og trygdarpolitikkin hjá Føroyum og Grønlandi. Hesi málsøki verða umsitin í Danmark, og tí er skeivt at tosa um trý javnsett lond, vísti Tórbjørn Jacobsen á.

## Tórbjørn hevur misskilt

Men Tórbjørn Jacobsen hevur misskilt eitthvørt, fekk hann at vita frá danska løgmálaráðharranum.

At eitt nú verjupolitikkurin verður umsitin í Verjumálaráðnum í Keypmannahavn merkir ikki, at hann verður umsitin av einum myndugleika, sum er danskur burturav. Verjumálaráðið er ikki ein serligur danskur myndugleiki, men ein ríkismyndugleiki, sum er felags fyri allar tríggjar partarnar í ríkinum. Landafrøðiliga liggur hann í Keypmannahavn, men talan er um ein ríkismyndugleika, vísti løgmálaráðharrin á.

- Fólkatingið er eisini ein ríkismyndugleiki, hóast tað liggur í Keypmannahavn, og Føroyar hava ávirkan á løggávuna um verju-, trygdar- og uttanríkispolitikk við sínum umboðum í Fólkatinginum. Tí standi eg við, at Føroyar, Grønland og Danmark eru javnsettir partar í ríkinum, svaraði Lene Espersen.

Fyri Tórbjørn Jacobsen er svarið ikki nøktandi, tí hann hevur eina aðra fatan av tingunum. Men hann hevði kortini ikki væntað sær annað svar frá ráðharranum.

## Sum gummi

- Tú kemur ikki nærri, tá ið tú setur tílíkar spurningar. Tað er sum gummi — líkamikið hvønn spurning tú setur, ella hvussu tú setur hann, so kann svarið toyggjast, so ráðharrin ikki kemur at siga ov nógv.

Tórbjørn Jacobsen royndi hósdagin at seta fleiri uppfylgjandi spurningar, og tað sama gjørdi fólkatingsmaðurin Kjeld Albrecthsen úr Eindarlistanum, sum vildi hava løgmálaráðharran at viðganga, at Føroyar og Grønland ikki hava somu rættindi í ríkinum sum Danmark. Eitt nú fáa londini ikki innlit í tær verjuavtalur, sum Danmark hevur gjørt við USA, og sum viðvíkja bæði Føroyum og Grønlandi.

Men løgmálaráðharrin var hvørki til at høgga ella stinga í. Meira var ikki at siga, og Tórbjørn Jacobsen kundi ikki annað enn taka hetta til eftirtektar.

## Halda lív í

- Hjá okkum, sum hava eina øðrvísi hugsan um støðuna enn stjórnin, er ikki annað at gera enn at spyrja meira og vísa á okkara støðu. Tað eru tey amboðini vit hava sum fólkatingslimir, og tey mugu vit brúka, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann er fullgreiður yvir, at hann neyvan nakrantíð fer at fáa ein danskan ráðharra at taka undir við nógvum av sjónarmiðunum, sum Tjóðveldisflokkurin hevur, men heldur tað kortini vera týdningarmikið at halda lív í kjakinum.

- Tá ið alt kemur til alt, so stendur og fellur endaliga avgerðin um framtíðarstøðu Føroya við viljanum hjá fólkinum. Tú fært ongantíð stjórnina at viðganga nakað, sum inniber, at Danmark má lata nakað frá sær, staðfestir Tórbjørn Jacobsen.

ítróttur

Nr. 43 • leygardagur • 2. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo



*VÍF eru greipuvinnarar. Hetta varð staðfest hóskvøldið, tá tær eisini vunnu fjórða landskappingardystin móti Stjørnuni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Stjørnan-VÍF 14-19 (7-10):

# Greipan er heima

**Kanska hava sigrarnir onkuntíð verið meira sannførandi og kanska hevur spælið til tíðir verið betri, men tað kann vera tað sama. Kvinnurnar hjá VÍF hava annað árið á rað ognað sær greipuna**

HONDBÓLTUR – KVINNUR

*Jákup Mørk*

Hetta varð staðfest, tá VÍF hóskvøldið vitjaði í Klaksvík og vann fjórða sigurin av fýra møguligum á Stjørnuni hetta kappingarárið.

## Venjarin var eftir

Upptaktin til dystin kundi tó neyvan verið verri fyri oddaliðið. Nógvi kavin, sum hevur órógva bæði fólk og fæ og ikki minst hondbóltsdystir, gjørdi sítt til, at ferðin til Leirvíkar, haðani Dúgvan fór, gjørdist heldur strævnari enn vanligt.

Ein trafikkproppur við Hvalvík gjørdi, at leikararnir vórðu seinkaðar til Leirvíkar, og tó at skiparin á Dúgvuni bíðaði, so eydnaðist ikki at fáa venjaran, Jørleif Kúrberg, og strikuspælarar, Randi Kúrberg, við til Klaksvíkar í fyrstu syftu. Saman við fleiri øðrum vórðu tey aftur seinkaði undir Gøtueiði, so tey máttu bíða til næsta fart.

## Dragnaði fyri steðgin

Fyrstu løtuna var eisini líkt til, at hetta órógvaði tað annars so stinna liðið úr Vestmanna. Í álopspartinum bar millum lítið og einki til, og tó at tær stóðu væl í verjuni, so var tað Stjørnan, sum spakuliga dró frá hesa løtuna. Munurin var kanska ikki so stórur, men høvdu tær á heimaliðnum hildið høvdið eitt sindur kaldari hesa løtuna, og hevði málverjin hjá VÍF ikki verið Manuela Stan, so kundi leiðslan eisini verið størri, men tað varð so av ongum.

Ístaðin tók VÍF seg spakuliga aftur, og tá so bæði Simona Dziugyte og Joan M. Joensen fóru út at hvíla sge, gjørdist heldur tunnligt hjá heimaliðnum. Ella var tað eisini tað, at nú var VÍF-venjarin loksins komin í høllina. Hvussu var og ikki, so gjørdi VÍF eitt veruligt hál seinastu løtuna undan steðginum, har 6-6 broyttist til 7-10 á máltalvuni.

## Stórtap hótti

Vendin hesa seinastu løtuni mundi uttan iva vera eitt gott sálarligt skump rætta vegin hjá VÍF, og fyrstu helvtina av seinna hálvleiki sást brádliga, hví tær hava verið so einaráðandi í føroyskum kvinnuhondbólti hesi bæði seinnu árini.

Tó at tær kanska gjørdu dekan ov nógv mistøk í álopsspælinum, so munaði hetta snøgt sagt einki hjá Stjørnuni. Verjan hjá VÍF var snøgt sagt átøk kinverska múrinum hesa løtuna. Har var snøgt sagt eingin vón hjá heimaliðnum at spæla seg ígjøgnum, og so kundi VÍF veruliga skrúva ferð á kontrahondbóltin. Einfalt, effektivt og vakurt varð mótstøðan hesa løtuna spæld niður og norð, og var tað ikki fyri bjargingarnar hjá Agnes í Stjørnu-málinum, so kundi talan verið um stórtap hjá Stjørnuni.



*Tað var fyrst og fremst í krútsterku verjuni, at sigurin hjá VÍF varð grundlagdur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Snaraði 180 stig

Hetta hendi tó ikki. Ístaðin tók dysturin eina merkisverda vend. Kanska helt VÍF, at gullið var heima. Kanska vóru tað nervar, sum brádliga gjørdu seg galdandi, ella kanska var tað reyða kortið til Randi Kúrberg, sum gjørdi, at VÍF misti takið.

Sum so kann orsøkin gera tað sama, tí brádliga fekk Stjørnan ferð á. Tær megnaðu nú at spæla seg inn um VÍF verjuna fleiri ferðir á rað, og í verjuni trýstu tær ferð eftir ferð VÍF gera mistøk. Eina mest tí tær samstundis valdu at mansverja bæði Ioanu og Sóley. 7-15 var støðan, tá 16 minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, men fýra minuttir fyri leiklok var munurin 14-16.

Bjargingin hjá VÍF kom tó, tá Jacklin Durhuus vann sær brotskast í gjøgnumbrotsroynd. Hetta setti Ioana í netið, og so loysnaði aftur. Stjørnan misti trúnna uppá, at tað kundi bera til, og við enn tveimum málum eftir skjótálop kundi Nicolina staðfesta. Ikki bara sigurin men eisini gullmerkini. Og tey eigur VÍF so væl og virðiliga uppiborið. Tær hava alt árið verið besta liðið í landinum, og talan skal verða um eina sensatión av teimum stóru, um stigaposin ikki verður so rokandi fullur, tá seinasti dysturin er leiktur.

Tillukku VÍF!

## Dysturin í tølum

**Stjørnan-VÍF 14-19 (7-10)**

Málskjúttar:
Stjørnan: Simona Dziugyte 4(2), Joan M. Joensen 3, Bára Skaale 2, Una Olsen 2, Andrijana Milodanovic 2(2), Anna Kristina Samson 1
VÍF: Ioana Rápa 6(3), Nicolina Eyðbjørnsdóttir 4, Jacklin Durhuus 3, Nicoleta Radu 3, Sóley Mikkelsen 1, Fríða Marjunardóttir 1, Alis Høghamar 1
Brotskøst: Stjørnan 7, VÍF 3
Útvísingar: VÍF 2
Diskvalifikatión: VÍF 1 (Beinleiðis reytt)
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Høvdu gott tamarhald á, hóast talan ofta gjørdist um nærdystir.